UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 16. august 2021
Journalnr.: 21/15918

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-015/2021 frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu, viðvíkjandi Hellutanga vesturi á Víkum

Spurningur:
1. Hvørjar verða umhvørvisligu avleiðingarnar av, at Hellutangi í longri tíð liggur vesturi á Víkum, og hvussu verður syrgt fyri, at tær verða avmarkaðar?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at økið vesturi á Víkum er vælegnað til aling?
3. Eru ætlanir um at tryggja, at tilbúgvingarætlan fylgir við umhvørvisgóðkenningum til aling o.a. virksemi, ið kann hava avleiðingar fyri náttúruøkir?

Svar
Roknað verður ikki við, at Hellutangi fer at hava serligar avleiðingar fyri havumhvørvið. Hellutangi hevur lítið ella einki av olju og øðrum dálkandi evnum umborð, og verður tí ikki roknað við nakrari týðandi dálking, um hann verður liggjandi til næsta summar. Hellutangi er ikki til ampa fyri eitt nú fiskiskap og skipaferðslu.

Kanningar av aldu- og streymviðurskiftum á Víkum vísa, at sjógvútskiftið er gott, og metir Umhvørvisstovan tí, at vandi fyri dálking frá rakstrinum er avmarkaður á aliøkinum á Víkum. Økið á Víkum liggur út til opið hav, og kann tað tí vera ein avbjóðing fyri bæði fisk og útgerð at vera á staðnum í vánaligum veðri.

Treytir eru í umhvørvisgóðkenningini fyri alingina á Víkum, at virkið skal hava mannagongdir at fyribyrgja óhappum, og hvat skal gerast, um óhapp hendir. Umhvørvisstovan er í ferð við at endurskoða umhvørvisgóðkenningar til alibrúk. Í góðkenningum fyri størri virki er ásett, at tey skulu hava tilbúgvingarætlanir.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 16. august 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður